

*Á fundinum í Vági í gjár, var álvarsama støðan í Suðuroy til viðgerar*

# Flakavirkið í Vági til sølu fyri 30 milliónir

**Stjórin í Fiskavirking hevur bjóðað suðuroyingum at keypa flakavirkið í Vági fyri 30 milliónir**

KREPPUFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Suðuroyingar hava nú fingið at vita frá Fiskavirking, at teir eru vælkomnir at keypa flakavirkið í Vági fyri 30 milliónir.

Tað varð upplýst á kreppufundi, sum arbeiðarafeløgini í Suðuroy skipaði fyri í Vági í gjár, um vánaligu støðuna í Suðuroy.

Við á fundinum vóru eisini umboð fyri bý- og bygdaráð í oynni, landsstýrisfólk og landsstýrisfólk.

Á fundinum tosað um, hvat kundi gerast við støðuna í Suðuroy, har arbeiðið er munandi minkað, serliga hetta seinasta hálva árið,.

Flakavirkið í Vági hevur staðið stilt í at kalla seks vikur, samstundis sum bæði Føroya Tele og Føroya Banki hava sagt fólki upp.

### 30 milliónir á borðið

Fundarfólk siga fyri Sosialinum, at á fundinum upplýsti borgarstjórin í Vági, at hon hevði verið í samband við stjóran í Fiskavirking og tað endaði við, at stjórin bjóðaði suðuroyingum flakavirkið í Vági til keyps fyri 30 milliónir.

Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági, sigur, at hon hevur verið í sambandi við nevndarformannin í Fiskavirking at vita, hvørjar ætlanir, fyritøkan hevur við virkinum í Vági.

- Nevndarformaðurin vísti til stjóran og í samrøðu við meg fríggjadagin, varð ein prísur upp á 30 milliónir fyri virkið í Vági, nevnt, sigur hon

Men tað fyriliggur so ongin ætlan um tað, leggur hon afturat.

Hon staðfestir, at Vágs Kommuna ætlar ikki á nakran hátt at leggja Fiskavirking fótonglar í vegin fyri virkseminum í Vági.

- Men sjálvandi hevur tað størsta áhugan hjá kommununi, at fáa at vita, hvørjar ætlanir, fiskavirking hevur við virkinum í Vági, tí tað hevur so stóran týdning fyri fíggjarstøðuna hjá Vágs Kommunu.

### Má takast upp

Kirstin Strøm Bech sigur, at býráðið fegnaðist um, tá ið fiskavirking fekk gongd aftur á virkið í Vági og at tað besta hevði verið, at arbeiðið á virkinum varð varðveitt.

Tað var rættiliga nógv arbeiðið á virkinum alla tað fyrstu tíðina, men seinastu vikurnar hevur onki verið.

Men klárar Fiskavirking ikki at hava virkið í Vági ígongd, er tað ein spurningur um, hvat so skal henda, um Fiskavirking er sinnað at lata onnur sleppa framat virkinum.

Men so er tað tann seinasti trumfurin og tað er, at Virkið hjá fiskavirking stendur á grund, sum er leigaður frá kommununi.

Og kommunan hevur fyrr róð framundir at siga sáttmálan upp, so at fiskavirking má taka virkið niður, so at onnur kunnu fáa atgongd til grundøkið.

Tann spurningurin er ikki aktuellur í løtuni, men kemur ikki gongd á aftur, er hetta ein spurningur, sum býráðið noyðast at taka upp, sigur Kirstin Strøm Bech.

- Vit eru ikki úti eftir, at fiskavirking skal selja virkið í Vági, men er áhugi ikki fyri at hava tað opið, má tann spurningurin eisini takast upp, sigur Kirstin Strøm Bech.

Vit hoyra meiri um fundin um støðuna í Suðuroy í seinni bløðum.

---

# Valskrá hjá Unga Tjóðveldinum fyri Tórshavnar Kommunu

UNGA TJÓÐVELDI
*tíðindaskriv*

**Ungdómsráð:**
Unga Tjóðveldið heldur tað verða týdningarmikið at ung verða hoyrd og at farið verður frá at serfrøðingar innan ungdóm verða hoyrd, heldur enn ungdómurin sjálvur.

Hetta skal gerast við at stovna eitt ungdómsráð, sum er mannað av umboðum úr fólkaskúlunum í kommununi, umframt einum miðnámsskúlanæmingi. Miðnámsskúlanæmingurin skal hava til endamáls at samskipa arbeiði og beinleiðis samstarv skal verða millum ungdómsráðið og Føroya Ungdómsráð.

Nevndin skal verða eitt beinleiðis talirør hjá teimum ungu í kommununi og til Býráðið. Gjørligt skal verða hjá fólkaskúlanæmingum og miðnámsskúlanæmingum í kommununi at senda uppskot til ungdómsráðið, sum ungdómsráðið síðan tekur støðu til og leggur fram fyri býráðnum um meiriluti er fyri tí.

Hetta krevur tó, at býráðslimir eru opnir fyri at taka uppskot frá næmingum til eftirtektar og ikki minst at taka uppskotini í álvara.

**Musikkskúli skal byggjast saman við Marknaðargilsdeplinum**
Unga Tjóðveldið heldur at okkara tónleikarar hava ikki nøktandi umstøður og tískil hevði tað verið upplagt at Tórshavnar býráð tók upp samrøðu við landsmyndugleikarnar til tess at fáa hølir til ein musikkskúla í Marknaðargilsætlanunum. Eisini skal tað vera við í ætlanunum at møguleikar verða hjá teimum, ið ikki eru næmingar á musikkskúlanum, at læna høli at venja í ella at hava framførslur í.

***Viðurkenna sína vitan***
Vit halda tað verða týdningarmikið, at okkara fólkavaldu viðurkenna at tey ikki eru alvitandi, og við hesum í huga leita sær til fólkið og til tær submentanir, sum eru í kommununi, til tess at hoyra hvat hesi hava á hjartanum. Vit í Unga Tjóðveldinum hava nógv samband við ung fólk, ið ikki trívast í Føroyum av ymsum orsøkum, og vanligt hevur verið at hesi fólk ongantíð verða hoyrd. Tí skulu okkara býráðslimir taka sær stundir til at seta seg saman við umboðum frá ymsum samfelagsbólkum, til tess at fáa kunning um teirra ynski og teirra tørvir.

Umrøddu samfelagsbólkar / submentanir kunnu t.d. verða tónleikarar, listafólk, fólkaskúlanæmingar og annars ung, ið eru virkin á ymiskan hátt.

Eitt nú í Espo kommunu í Finnlandi hava politikarar verið í barnagørðum og frítíðarskúlum, har tey hava spurt børnini, hvat tey ynskja í teirra gerandisdegi har, og hava tey góðar og úrlslitaríkar royndir av hesum. Hetta prógvar, at fólkaræði virkar til fulnar, líka niður til 4 ára aldurin.

**Ókeypis barnaansing fyri ungar familjur**
Unga Tjóðveldið vil virka fyri, at øll barnaansing í kommununi verður ókeypis fyri foreldrini. Hetta merkir at kommunan yvirtekur gjaldið, sum í dag liggur á foreldrunum fyri at hava børnini ansaði, og at hetta verður fíggjað av íløgupartinum hjá kommununi sum ein sosial íløga. Í dag gjalda foreldur umleið 20 mió. til kommununa fyri barnaansing, og er ætlanin at henda útreiðsla framyvir verður borin av kommununi. Hetta fer at gera tað meira eggjandi fyri ungar familjur at seta búgv í Tórshavnar kommunu, og er hetta samstundis ein lætti hjá einstøkum uppihaldarum.